# Opin smiðja við opnum eldi

**VINNA** Hesar seinastu mongu mánaðirnar hevur Mikkjal Joensen arbeitt við at fremja dreym sín í heimbygdini, Trøllanesi. Nú er komið hartil, at 1. byggistig av ætlanini um "Mikkjals Smiðju" verður tikið í nýtslu.

Snorri Brend

**Trøllanes:** Hósdagin verður skipað fyri móttøku í Smiðjuni hjá Mikkjali.

Henda serstaka smiðjan er partur av verktæalini Economusée, har hon í framtíðini verður latin upp fyri ferðafólki og øðrum áhugaðum. Inni í smiðjuni verður høvi at kunna seg um føroysku smiðjusøguna og jarnsmíð sum siðbundið handverk.

Málið er, at smiðjan skal menna førleikar, sum í dag eru horvnir. Høvið skal vera hjá ungdómi og øðrum, ið hava áhuga við jarnsmíð at síggja, hvussu jarnsmíð fór fram, áðrenn tað bleiv mekaniserað. Møguleiki verður eisini fyri at hava listaliga verkstovu í smiðjuni, skrivar heimasíðan hjá Útoyggjafelagnum.

Í smiðjuni hjá Mikkjali er essa/opin eldur og tey amboð, ið eru knýtt at jarnsmíði í essu, men smiðjan hevur eisini øll nýmótans amboð.

Móttøkan hósdagin er bert fyri innbodnum, men seinni í summar er ætlanin at almeningurin eisiniskal fáa høvið at vitja hesa serstøku smiðjuna á Trøllanesi.



HANDVERK

*Mikkjali Joensen á Trøllanesi hevur altíð dámað væl listsmíð. Nú sleppur hann at fremja dreym sín í egnari smiðju í heimbygdini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Sjálvlærdur

Mikkjal er sjálvlærdur smiður og hevur fyri tað mesta arbeitt við umvælingum.

Hann hevur tó alla tíðina, síðan hann var smádrongur, dámað best listsmíð, tað vil siga at gera prýðislutir úr jarni. Mikkjal hevur smíðað fleiri portur, jarn- og trappuverk, kirkjuspír og annað. Hann framleiðir eisini smærri lutir úr jarni, eitt nú ljósastakar, knagar og slíkt.

At Mikkjal Smiðja er vorðin eitt Economusée merkir, at smiðjan er partur av einum evropeiskum og kanadiskum netverki, ið hevur sum uppgávu at marknaðarføra og halda lív í siðbundnum handverki og hjúkla um handbornan kunnleika.

### 1. byggistig

Mikkjal Smiðja er nú umbygd og fyrsta byggistig er liðugt.

Næsta byggistig fevnir um útbygging suðureftir, og har skal m.a. vera sølubúð, framsýning, cafe og umstøður at hava frálæru. Næsta byggistig verður vónandi liðugt komandi ár, treytað av, at endalig figging fæst til tiltakið.

Fyrra byggistig er liðugt nú, og málið er at næsta byggistig skal byrja í heyst og vera liðugt komandi summer.

# Frískúlin heldur fram

Nú er skjótt eitt ár ligið síðani Frískúlin Keldan byrjaði. Í løtuni verða fyrireikingar gjørdar at taka ímóti næstu næmingunum.

Snorri Brend

**Í Skálafirði:** Frískúlin byrjaði í fjør við einum forskúla flokki og einum fyrsta flokki, og til komandi skúlaár verður tikið ímóti einum nýggjum forskúlaflokki.

Í tí sambandi skipar skúlin fyri einum kunnandi fundi í Kelduni nú týskvøldið, har møguleiki eisini verður at tilmelda børn til forskúlan.

Á fundinum verður m.a. greitt frá, hví tey velja at hava forskúla og hvussu dagligdagurin verður skipaður.

Forskúlin og 1. flokkur hava eisini nakrar felagstímar, umframt at tey eru saman til verkstaðarundirvísing.

- Vit leggja stóran dent á eina góða innskúling í einum forskúla, sum skal fyrireika børnini at fara í skúla, sigur Jastrid Høj, skúlaleiðari. Hetta verður gjørt við at uppbyggja eitt gott sjálvsvirði, sum gevur tryggleika og rúm fyri læring.

Frískúlin Keldan heldur til í samkomubygninginum hjá Kelduni í Skálafirði.



SKÚLI

*Frískúlin í Skálafirði byrjaði í smáum eftir summarsteðgin í fjør. Í summar verður lagt til brots aftur til nýggjum flokki*

## Oyggjablaðið næstu ferð: Grønland

**Mikudagin hevur Oyggjablaðið sett heimsins størstu oyggj í fokus. Her hava vit viðkomandi tilfar bæði úr Grønlandi og úr Føroyum. Lesið í hesum blaðnum m.a.:**



**Marthu dámar best at arbeiða**



**Bygdabørnini skulu útbúgvast betur**



**Eru spentir uppá oljuvinnuna**



**Fleiri kvinnur skulu leiða**




**Bíligari at flúgva til Danmarkar**